# *Søgufólk úr Suðuroy*

*Jákup Berg*

Í 13. bindi av »Fróðskaparritum« í grein nevndari »Färöiska sagoberättare« fregnast *Åsa Nyman* eftir gjøllari frásøgnum um heimildarfólk í Suðuroy til ævintýr í bók dr. Jakobsens »Færøske Folkesagn og Æventyr« (1898-1901) og V. U. Hammershaimbs (í 1840-árunum).

Åsa Nyman heldur fyri, at hon vil vóna, at grein hennara fer at elva persónum, sum vita um søgufólk, at hjálpa her. T. d. sigur hon m.a.:

»Från Suðuroy finnas visserligen ett 15-tal sagoupptekningar, men om ingen enda av de åtta namngivna sagoberättärna där ha biografiska uppgivter influtit. Dessa åtta personer äro följande: 1) *Margrete Danielsen* och 2) *Elsebeth Malene Jespersdatter* från Porkeri, 3) *Fredrikke* och 4) *Anna Sofie Langgaard*, 5) *Maren Hansen*, 6) *Anna Sofie Jensdatter*, 7) *Anna Sofie undir Hamri* från Sumba och slutteligen 8) *Christiane Schrøter* utan närmare platsbestämning. De tre sidstnämda varo sagosmän til V. U. Hammershaimb, altso redan på 1840-talet och torde därför vara något äldre än de övriga. Eftersom Suðuroy representerer en stor och relativt självständig del av Färöarna vore det värdefullt att få uppgifter även därifrån.«)1

Vil eg tí her loyva mær at siga eitt sindur frá hesum persónum, ið greinskrivarin fregnast um.

Heimildarfólk síni nevnir Jákup doktari aftast í bók sínari, tó so, at hvør, ið tær einstøku *sagnirnar* hevur sagt, fæst ikki at vita; men *ævintýra*listin sigur, hvør ið sagt hevur hvørt ævintýrið. Og merkiligt tykist, at *menninir* eiga mesta sagnatilfarið í Suðuroy, meðan *kvinnurnar* at kalla umboða ævintýrini.

1) *Margrethe Danielsen, Porkeri.*
Elsebeth Susanna Godtfred, bóndakona á Heyggi í Porkeri f. 1871, d. 1936, abbadóttir Daniel Pedersens (1808-1884) óðalsbónda á Fløttinum, ið var bróðir Gjørðabóndans, (Lars Pedersen), segði einaferð, eg fregnaðist um heimildarfólk Jákups doktara í Porkeri og nevndi Margrethe Danielsen: »Tað man vera *Greta í Búðini!*[2] . — Soleiðis hevur hon verið nevnd har í bygdini. Hennara fulla navn var Maren Margrethe, og hevur hon verið skrivað Larsdatter. Foreldrini vóru Gjørðabóndin Lars Pedersen (1798-1861) og Anna Sophie Johannesdatter, Skálavík (1796-1870).[3] Greta varð fødd 21. oktober 1828 og doyði í 1907. Gift var hon við Jens Vilhelm Danielsen í Búðini í Porkeri (1818-1895). Ikki hevur verið so langt ímillum tær báðar skyldkonurnar Elsebu Súsonnu og Gretu — báðar vóru ættaðar úr Gjørðum sum sagt. Uppvaksin í bóndahúsi, har ofta nógv fólk var og altíð onkur, ið var tíðindafróður uppímillum, hevur Greta alt frá ungdómsárum sitið væl undir orðinum og sum Glørðaslagið alt dugað væl at sagt frá aftur. Hon hevur óivað havt manga góða løtuna í Gjørðum, tá ið kvøldseturnar vóru, og bóndans

Fróðskaparrit 32. bók (1985): 103-106.

arbeiði gekk í góðum lagi við rokkahurri, karðagnaddi og stokkaglinti, meðan onkur søgufróður hevur sagt frá. Hon vaks jú upp í tíðini, áðrenn umskiftið ella broytingin kom: fríhandil og skipsfiskiskapur, og hevur so statt sogið ta gomlu bóndamentanina við móðurmjólkini. Eisini man móðirin hava sagt henni eitthvørt, og ivaleyst man hon hava havt ævintýrabøkur at hyggja í — bøndurnir í teirri tíðini vóru ikki sørir við bøkur heldur enn nú.[4]

Greta í Búðini hevur sagt ævintýrið nr. 4 d í bók dr. Jakob Jakobsens »Færøske Folkesagn og Æventyr« Tillæg: »Gentan í risahedlinum«.

2) *Elsebeth Malene Jespersdatter*, *Porkeri*

Áðurnevnda Elsebeth Súsanna visti at siga, at henda konan var úti á Klova; hon var ættað úr Fámjin, fødd 20. juli 1813. Foreldrini vóru óðalsbóndin Jesper Michelsen, f. 1780 og Anna Thomasdatter, f. 1790. Elsebeth Malena var gift við Michael Jacobsen úti á Klova í Porkeri. Hann varð føddur í Porkeri 10. juni 1863 og doyði í 1884. Foreldur hansara vóru Jacob Danielsen, f. 17. september 1773, d. í 1854, og Maren Michelsdatter, f. 9. oktober 1779, d. í 1864. Elsebeth Malena hevur sagt ævintýrið nr. 60 í FFÆ (Tillæg til Æventyrene): »Kongasonurin, ið tikin var av sjótrødlakonginum« og nr. 66: »Gentan, sum jomfrú Maria tók« og nr. 71 a: »Klóka Margreta«.

Jacob Danielsen, nevndur Jákup á Klova, mundi vera annar teirra, ið Poul Johannes Poulsen (1823-1907) á Økrum, yrkir um í táttinum um Nesbóndan, verfaðirin Andreas Djurhuus (1787-1870), av Nesi í Eysturoy — festi á Nesi í Suðuroy í 1827. Teir skuldu gleða seg báðir — Sakaris og Jákup — tá ið teir frættu, at bóndin var deyður:

».........
Sakaris beiggin og Jákup á Klova
Harranum lova!«[5]

3) *Frederikke og* 4) *Anne Sofie Langgaard, Sunnbø.*

Tað vóru tvær systrar við hesum eftirnavni, ið bóru annað fornavnið Frederikke: Maren Malene Frederikke, f. 1870, d. 1954, gift við Andreas Jensen, snikkara, ættaðum av Viðareiði (1859-1926) og Mariane Frederikke, f. 1877, d. 1952, gift við Daniel Johan Joensen í Kvínni (1877-1962). Hugsast kann, at tað hevur verið tann eldra systirin, ið hevur sagt ævintýr fyri Jákupi doktara. Anna Sofía varð fødd í 1875 og doyði 1956. Hon var gift við Daniel Jacob Joensen í Kvínni (1876-1921). Foreldur teirra vóru Niclas Langgaard, kongsbóndi í Laðangarði. f. 13. september 1841, d. í 1920, og Mariane Symphor, f. 24. novbr. 1852, d. í 1939.

Fredrikka hevur sagt ævintýr nr. 2 c FFÆ: »Risans klóta«, nr. 14 e FFÆ: »Øskudólgur«, nr. 40: »Drongurin, ið fekk kongadóttrina attur frá sjótrødlinum« ella »Tað gráa esilið«.

Anna Sofía hevur sagt ævintýr nr. 30 a FFÆ: »Bíttlingurin« (»Bítti Gutti«). Anna Sofía og Fredrikka hava sagt ævintýr nr. 19 b í FFÆ: »Krákudóttir og kalsdóttir« og nr. í 59 FFÆ: »Kongurin og risin«.

5) *Maren Hansen*, *Sunnbø*

Soleiðis nevnist hon í bók Jákups doktara (FFÆ). Men rætta navn hennara er Maren Sofie Hans Jacobsdatter.[6] Hon varð fødd 11. apríl 1823 á Keltagørðum í Sunnbø, d. í

1892. Foreldur hennara vóru Hans Jacob Hansen, kongsbóndi, f. 7. august 1795 í Tórshavn, d. í 1856, og Sunneva Maria Thomasdatter, f. 2. september 1804, d. í 1892.

Marin Sofía giftist 3. november 1842 við Jesper Vilhelm Augustinussen í Vági, Jaspur í Smillum nevndur. Hann varð føddur í 1815, d. í 1877. Foreldur hansara vóru Augustinus Thomasen í Smillum, f. um leið 1787, d. í 1847. Jaspur í Smillum var skúlalærari. Eftir gamla Tórð Torsteinsson (1759-1846) fekk hann í 1840 ferðalæraraembæti í syðra helmingi Suðuroyar. Men av ymiskum orsøkum segði hann seg frá eftir at hava verið lærari bara í tvey ár.[7]

Marin Sofía hevur óivað eisini havt góðar atstøður at ogna sær kunnleika; pápin var jú eisini bóndi, og maðurin lærari sum nevnt, so ikki er at undrast á, at ævintýrið »Gabbarin í torvuni« hevur fest seg í hug hennara so, sum V. U. Hammershaimb hevur fest tað á blað eftir hana og Jákup doktari tikið tað við í bók sína *Førøske Folkesagn og Æventyr* (*nr.* 21 *b*).

6) *Anne Sofie Jensdatter, Hørg, Sunnbø*

Hon varð fødd 3. oktober 1819. Foreldur: Móðir hennara var Anna Elisabeth Maria Sørensdatter, búsitandi Uppi í Kvíggj í Hørg í Sunnbø. Hon var ættað úr Kollafirði (systurdóttir tann kenda Poul Jacobsen Midjord (1790-1878) á Økrum, Pól á Miðgerði nevndur). Anna Elisabeth í Kvínni varð fødd í 1800 og doyði í 1868.

Maður Onnu Elisabeth — faðir Onnu Sofíu — var Jens Olesen, ættaður úr Ólhúsi í Hørg, f. í 1787, d. í 1832. Hann var fyrsti maður, ið búsettist á Økrum og varð nevndur Jenis á Økrum ella Jenis á Tanganum. Hann doyði heldur ungur, og so fluttu konan og børnini til Sunnbiar at búgva.

Jenis á Økrum og Dímunarbóndin (1777-1820) — eisini nevndur Jenis, festi 1807, hann var eldri — vóru brøður. Á vitjanarferð Dímun 1816 hitti hann Onnu Elisabeth, og giftust tey árið eftir. Eisini her hevur bóndamentanin rinið við.

7) *Anna Sofía undir Hamri, Sunnbø*

Anna Sofie Joensdatter, fødd 28. septbr. 1817, deyð í 1902.

Hon var gift við Johannes Poulsen í Sakarisstovu í Sunnbø. Hann var føddur 14. september 1822 og doyði í 1887.

Foreldur hennara vóru: Joen Thomassen, óðalsmaður í Sunnbø, føddur 13. apríl 1792, deyður í 1869, og Rachel Marie Niclasdatter, nevnd Rakul undir Hamri, fødd 17. mars 1799, deyð í 1871. Sagt verður, at Rakul undir Hamri skuldi duga so væl at yrkja, at hon gekk Póli Jóhannesi á Økrum næst har suðuri. Móðir hennara Elsebeth Michelsdatter (nevnd í FFÆ s. 460), Elseba á Stalli (við Kvíggja) nevnd, fødd í 1764, var eisini ein mentað kvinna. Hon hevði eisini skaldagávur og segðist at duga 400 kvæði, vísur og sálmar. Hon var gift við Niclasi Poulsen frá Kráum í Vági, f. í 1760. — Stallættin er frá Vísa Pætturi Gunnarssyni, bónda við Kvíggjá, ið nevndur er í søguni um Snopprikk, Giljabóndan og Laðangarðsbóndan (nr. 2 í FFÆ) og í jarðarbókum 1584-1641/42.[8]

Elseba á Stalli var móðir Jacob Niclasen (1800-1893), Jákup sunnbingin, teir róptu, í Havn. Hann var abbi Jákups doktara Jakobsen (1864-1918). Menn vilja vera við, at bókaansur feðganna Jákups og Hans Nikláa Jakobsens (1832-1919), ið stovnaðu bókahandilin (1865) í Havn, var ættararvur av

Stalli. Og Jákup doktari og systrarnar mundu ikki bregða úr ætt!

8) *Christiane Schrøter*

Elisabeth Christiane Schrøter varð fødd við Gjógvará í Vági 20. januar 1803, doyði (ógift) 9. februar 1873 á Nesi, Eysturoy, hjá V. U. Hammershaimb prósti, ið hon hevði skrivað alt, sum hon átti. Foreldur hennara vóru Johan Hendrik Schrøter, prestur í Suðuroy (føddur 25. febr. 1771 í Havn, deyður har 14. novbr. 1851) og Mariane Sophie (f. Hammershaimb 13. juni 1773, deyð 14. juli 1828).

Í yvirlitinum yvir heimildarfólk eru Christiane Schrøter sett fyri nr. 44 bl í FFÆ: »Teir sjey svanirnir«. Dr. Jakobsen sigur í viðmerkingini »Tillæg til Æventyrene A. Tillægsvarianter« her m.a.: »En opskrift i V. U. Hammershaimbs besiddelse, efter fortælling af Christiane Schrøter, Suderø, stemmer i alt væsentligt med den her meddelte Fugløopskrift.«

**Viðmerkingar:**

1) Åsa Nyman: »Färöiska sagoberättere«. Fróðskaparrit 13. bók, s. 62-77. Tórshavn 1964.
2) Frásøgn (1930) um heimildarfólk eftir Elsebeth Súsonnu Godtfred, Porkeri (1871-1936.)
3) Fólkateljing í Porkeri 1845, 1880, skifti- og kirkjubøkur.
4) Meting mín
5) Ørindið hoyrt frá barnaárum í Hovi. Prentað í bók Elsebeth Vestergaards: »Feðgarnir Miðgerða Poul og Poul Johannes«, s. 76. Gøtu (1975).
6) Fólkateljing í Sunnbø 1855.
7) Páll J. Nolsøe: »Skúlaviðurskifti á bygd 1845-54«. Varðin XXVII (1950), s. 28-64.
Poul Andreasen: »Úr Vágs søgu«. Klaksvík (1977), s. 110-111.
8) Poul F. Joensen: »Seggjasøgur úr Sumba«. Tórshavn (1963), s. 58.
Anton Degn: »Færøske Kongsbønder 1584-1884«. Tórshavn (1945), s. 278.
FFÆ = Jakob Jakobsen: Færøske Folkesagn og Æventyr 2. útg. Tórshavn 1971-75.

**Summary:**

In an article »Färöiska sagoberättare« in Fróðskaparrit, vol. 13, Åsa Nyman appealed for biographical information on Faroese folktale-tellers. The above article contains such information about 8 women on the island of Suðuroy, who have told folktales (fairy tales) to Jakob Jakobsen and V. U. Hammershaimb.